tíðindablaðið
sosialurin
www

Ábyrgð
Jan Müller

Ritstjóri
Eirikur Lindenskov

Blaðamenn
Jonhard Hammer
Dagbjørt S. Hansen

Ljósmyndarar
Áki Bertholdsen,
Turið Kjølbro
Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen
John Johannessen
Sveinur Tróndarson
Eyðun Klakkstein
Høgni Mohr
Jákup Mørk

Umbrot
Jens Kristian Vang
Álvur Haraldsen

Útgevi
Sp/f Sosialurin

Prentsmiðja
Argjavegur 26, Argir

Postsmoga 76,
110 Tórshavn
Telefon 311820
Telefax 314720
Netfang post@sosialurin.fo
Lysingar lysing@sosialurin.fo
Heimasíða Sosialurin

Oddagrein

IKKI kann sigast annað enn, at Vaktar- og Bjargingartænastan og her ikki minst manningarnar á vaktarskipunum hava gjørt eitt gott arbeiði, nú tað er komið undan kavi, at fleiri útlendsk skip hava fiskað meira, enn tey høvdu loyvi til. Hendingarnar í seinastuni, har ikki færri enn trý norsk línuskip eru tikin, og tvey teirra hava havt ov stóra hjáveiðu, eru dømi um, at okkara vaktar- og eftirlitsmyndugleikar á sjónum fungera. Og hetta eiga fólkini á hesum stovni rós uppiborið fyri. Ikki minst tá hugsað verður um tær umstøður, sum okkara politikarar og myndugleikar annars hava boðið teimum nú í langa tíð - og her serstakliga eftir at vaktarskipið Ólavur Halgi varð seldur av landinum. Loksins eydnaðist tað so at fáa Gorm inn í flotan, men hóast talan er um ein gamlan Gorm, so hevur tað kortini víst seg at vera eitt effektivt skip - við effektivari manning.

NÚ verður so nýtt vaktarskip bygt. Tað er greitt, at Føroyar sum tjóð hava á ongan hátt ráð til at vera eina góða vaktar- og eftirlittænastu fyriuttan og eiheldur eina skerda tænastu. Við okkara geografisku støðu í Atlantshavi og við ábyrgd fyri einum av heimsins ríkastu havøkjum, er ein munadygg tænasta av hesum slag altavgerandi. Talan er jú um at verja okkara egna tilfeingi og her ikki minst við komandi ættarliðum í huga. Tað átti at verið ein grundfestur regul, at seinasta stað, har sparast skal á tí almenna økinum, er nettupp innan Vaktar- og Bjargingartænastuna. So er tað sagt. Og her eiga vit so eisini at hava eina komandi frálandavinnu í tonkunum, tí tá farið verður at leita eftir olju, kemur hesin stovnur at hava alstóran týdning til tess at tryggja umhvørvi og fólkini, sum arbeiða í hesi vinnu. So eisini hesin útviklingurin krevur av politikarunum, at teir geva stovnum sum V&B ans. Talan verður her um at hava eina 100% effektiva tilbúgving. Og verður nakað slingur í valsinum her, so fáa vit tað aftur í gráum kolskinni. Tá vit tosa um sjóverjuna í dag, so er ikki bara talan um at vera á varðhaldi eftir útlendskum og fyri tað eisini føroyskum veiðutjóvum. Talan er so sanniliga líka nógv um at kunna veita okkara fiskimonnum eina tænastu, sum teir hava krav uppá. Her verður hugsað um at hjálpa fiskiskipum í trupulleikum av ymsum slag, og ikki minst at hava eina tænastu, sum vendir sær til heilsuna og gerandistilveruna hjá hvørjum einstøkum av okkara sjómonnum, meðan teir eru úti á havinum.

SPURNINGURIN um donsku sjóverjuna undir Føroyum er tí eisini nakað, sum eigur at verða tikið fram, tá tosað verður um umrødda mál. Og her vita vit, hvussu stóran týdning danska sjóverjan hevur havt og hevur. Miðjað verður so ímóti, at føroyingar skulu kunna yvirtaka størri og størri part av tí, sum aðrir hava gjørt, og er hetta sjálvandi rætt og rímuligt. Men her er eisini talan um krevjandi og kostnaðarmiklar uppgávur, so talan kann ikki verða um at kvetta á stokkinum frá degi til dags. Vónandi kunnu danskir og føroyskir myndugleikar á hesum økjum halda fram við tí góða samstarvinum í framtíðini eisini.Spurningurin um tyrlutænastuna hevur verið nógv frammi júst í hesum sambandi. Og her mugu vit bara síggja til, at tað ikki bráddliga verður eitt hol í skipanini. Her má ikki slakast ein tumma. Veitingarnar, sum tyrlurnar hava staðið fyri og sum hava so ómetaliga nógv at siga fyri sjófólk okkara og ikki minst fyri sjúkraflutning millum oyggjarnar eisini, mugu ikki skerjast.

Sosialurin

Viðmerking:

Viðm. til Jógvan K. Mørkøre formann í Føroya Kommunufelag

Tað sær út til at verða púra ómøguligt at verða ósamdur við Jógvan K. Mørkøre, form. í Føroya Kommunufelag, tí hann hevur eina meining í dag og aðra í morgin. Tí má eg spyrja um hvussu nógv veit J. K. Mørkøre um viðurskiftini á økinum, sum hann úttalar seg um, vegna allar kommununar í Føroya Kommunufelag.

Tann skipanin ið er galdandi við 3 býtinum av útreiðslunum hevur virkað væl. Sum leiðari av dagrøktarskipan og dagstovni á bygd, havi eg altíð fingið góða og holla vegleiðing frá Stovnsdeildini og tí pedagogisku ráðgevingini á Almannastovuni. Tó má sigast, at eftirlitið hevur bert verið økonomiskt. Viðv. tí innihaldsliga partinum, virkseminum á stovninum hevur als onki eftirlit verið. Pedagogiskt eftirlit eksisterar ikki í Føroyum. Tó vil eg meta, at økið er væl skipað, tó at vit sum arbeiða á gólvinum fegin vildu haft at eitt eitt pedagogiskt eftirlit var, sum kundi verið við til at birt undir menning og framburð.

Tí eri eg fegin um uppskotið til nýggja løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt. Hon gevur okkum teir tiltrongdu karmarnar,ið vit hava mangla síðani fyrsti barnagarðurin í Føroyum var stovnaður í 1931.

Men hvat er so tað, sum fær ein til at hugsa bíða bíða. – Jú tað er, at landið yvirletur alla ábyrgd uppá ein gang til kommununar, bæði stórar og smáar. Bæði tær, ið hava stóra central-umsiting og tær, hvar umsitingin er so lítil, sum hon kann verða.

Ampin gongur eisini uppá tann hugburðin, sum Jógvan K. Mørkøre er so heitur talsmaður fyri – at »tey ið gjalda eisini skulu valda« tvs. at kommunur við sínum 70% av rakstrargjaldinum kunnu finna uppá at brúka hvat sum helst til dagstovn.

Hetta fer í ringasta falli at merkja, at tað sum er bygt upp verður syndrað. Ítróttarhús, samkomuhús, ítróttarhallir, bygdarhús - you name it - alt kann nýtast til endamálið.

Tey krøv, ið enn eru galdandi og vónandi framhaldandi fara at verða galdandi til stovnsetan av stovnum, nemliga góðkenning frá Landslæknanum, Brunaumsjón Landsins og Arbeiðseftirlitinum, eru garantiurin fyri at kreativar loysnir ikki síggja dagsins ljós - og tó t.d. Nólsoy -

Útjaðaraøkið tvs. teir smáu dagstovnarnir og dagrøktirnar úti á bygd hava ringt við at fáa útbúgvið fólk, vit hava ikki í sama mun tiltrekningskraft sum stovnarnir í Havn og á stórbygdum. Tí má ansast eftir at útjaðarin ikki fellur púrasta burturímllum og at tann framburður ið er, ikki syndrast.

Tí eitt er greitt, at uppgávan fyri útjaðarastovnarnar ofta er tung, tí umsitingin í kommununum er lítil og harafturat skal stovnurin ofta røkja uppgávur viðv. børnum, við serligum tørvi fyri umkringliggjandi kommunur, ið ongan dagstovn hava. Tí er tað ikki nokk sum Jógvan K. Jørkøre framførir, at bara leiðarin er útbúgvin, so er alt í fínasta lagi. Erfaringin sigur mær, at uppgávan er størri enn sum so. Tað skulu bæði vælútbúnir pedagogar og hjálparfólk afturat leiðaranum.

Er tað ringt at fáa útbúgvið fólk at arbeiða á bygd í dag, so verður tað púra ómøguligt um tann dagstovnurin sum skal byggjast/stovnsetast eftir høvdinum hjá Jógvan K. Mørkøre nakrantíð sær dagsins ljós. Tá fara eisini vit sum arbeiða á bygd at hugsa okkum væl um.

Fyri mær er málið at vit framhaldandi menna bygdirnar, at ung fólk kunnu seta búgv og at møguleiki er fyri at børnini kunnu verða ansaði undir tryggum og mennandi umstøðum, í hølum, sum eru ætlaði til endamálið og við nærløgdum starvsfólki.

Vinarliga Súsanna Holm,

Ég vil hervið mótmæla, at farið verður undir at royndarbora á Føroyska landgrunninum og á tí øki, sum nátturliga hoyrir til Suðuroynna, tí at hettar ikki verður gjørt út frá Suðuroynni.

Oljumálastýrið er lagt í miðstaðarøkinum og eru longu tredivu fólk í starvi har er mær fortalt. Hesi størvini áttu at verið her í oynni, alt annað er ónattúrligt í mínum eygum. Oljan er í okra sjóøki, sjálvandi átti umsitingin eins væl og oljuhavnin at verið her.

Tað má koma til tað, at okur Suðuroyingar fara at krevja, at øll umsiting av oyggj okra, bæði á landi og sjógvi, verður í oynni. Útskriving av fiskiloyvum eins væl og oljuloyvum á okra leiðum gongur út herfrá, og øll umsiting annars verður her á staðnum.

Bara sølan av tunfiskaloyvum og svartkjaftaloyvum í okra sjógvi hevði verið nokk til at rikið Suðuroyar Sjúkrahús og alla oynna annars fyri. Nú ganga ávísir menn við hesum loyvum í lummanum og selja út til hægstbjóðandi, ongin veit, hví teir hava fingið tey, men teir selja so føroyska fiskatilfeingið fyri egnan vinning.

Oljan og fiskatilfeingirundanum Suðuroynna er meir enn nokk til, at onkur kundi klárað okkum sjálv. Tí mugu okur krevja, at okur skulu umsita tilfeingið sjálvi, soleiðis at okra ungdómur kann fáa arbeiði í umsitingini her á staðnum og ikki noyðast at flyta ov oynni fyri at fáa arbeiði.

At oyggin fer at doyggja út um nøkur ár við núverandi gongd eru nokk flest samd um. Lat okkum eisini blíva samd um at loysa frá restini avoyggjunum og nýta tað ríkidømi, ið natúrliga hoyrir oyggj okra til, tá verður liviligt her at vera.

Svenning Borg, Vágur

Roynderfiskiskapurin eftir tunfiski kannast

Ólavur í Beiti

Tað er rættiliga nógv komið fram um royndarfiskiskapin eftir tunfiski seinastu dagarnar, har tað eisini er komið fram at rættiliga fitt av peningi er í hesi vinnu, ikki minst til teir sum loyvini hava. Í spølni førdi onkur fram, at hevði Fiskimálastýrið sjálvt havt loyvini og seldi tey víðari og fekk allan ágóðan av søluni, stóð ikki á at bygt minst eitt vaktarskip aftrat tí nýggja, sum verður bygt í løtuni.

Valdi at halda fram

Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, sigur, at nú verur alt viðvíkjandi royndarfiskiskapinum eftir tunfiski kannað og enn er ikki avgjørt, hvat hendir í ár.

– Eg var nýggjur landsstýrismaður í fiskivinnumálum og valdi tí at halda fram við verandi skipan, men nú er so spurningurin, hvussu langt vit eru komin, um vit hava fingið nóg mikið av vitan av royndarveiðini, um vit hava fingið nóg mikið at vita um fiskileiðirnar í okkara sjógvi, marknaðin og annað mangt tengt at hesum fiskiskapi.

Lært okkum nógv

– Tað er eingin ivi um, at japanar hava givið okkum sera stóra vitan um henda fiskiskap, og spurningurin er tí eisini, um vit hava fingið nóg mikið til at kunna kára alt sjálvir. Og aftrat hesum koma so mangir aðrir spurningur, eitt nú spurningurin viðvíkjandi ICCAT, har vit enn ikki hava limaskap.

– Okkara fremsta mál er at fáa tunfiskaveiðina til eina lønandi vinnu, og tí ræður um at leggja alt so væl til rættis sum gjørligt. Vit krevja okkara rætt til hetta tilfeingi og tí ræður eisini um at gera tað rætt, og tað kann verða ringt, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.

– Tá ið vit hava fingið mest møguliga vitan og atgongd til røttu marknaðirnar verður ikki talan um nakra royndarveiði, men spurningurin verður nú kannaður, um vit eru komnir hartil, leggur Jørgen Niclasen at enda aftrat.

Vilt tú vera við
í Føroya fremstu KT-fyritøku?

NAVISION®
solution center

Formula.fo hevur sín uppruna afturí í 1983, tá fyrsta felagið í koncernini, P/F Petersen & Guttesen, varð stovnað.

Formula.fo selir og mennir fyrisitingarligar loysnir innan fíggjarstýring og journalisering, umframt framleiðsluloysnir innan fiskivinnuna. Eisini letur Formula.fo KT-loysnir til skrivstovuna.

Formula.fo leggur stóran dent á at hava vælútbúgvið starvsfólk, við dagførdari vitan. Formula.fo hevur m.a. starvsfólk við Microsoft Certified System Engineer útbúgving, er einasta fullmannaða Navision Solution Center í Føroyum og eru vit eisini Siemens Qualified Partner.

Á Formula.fo starvast í løtuni uml. 60 fólk á ialt 1500 m², í tveimum bygningum.

Vit hava tørv á 4 forritarum til høvuðsdeild okkara í Tórshavn. Talan er um tveir forritarar til fíggjarstýringsskipanina Navision Financials og tveir forritarar til skjalaskrásetingarskipanina DocuLive.

Navision Financials	DocuLive
Starvsuppgávan verður at forrita tillagingar í standard skipanini, samstundis sum givin verður tænasta/support av verandi tillagingum.	**Starvsuppgávan** verður at veita tænastu/support til DocuLive, samstundis sum tillagingar til standard skipanina skulu gerast.
Tú ert datamatikari ella hevur arbeitt eitt drúgvt tíðarskeið við bókhalds- og fíggjarstýringsskipanum. Tú kannst bæði arbeiða sjálvstøðugt og saman í bólki.	**Tú ert datamatikari** ella hevur arbeitt innan SQL og Visual Basic. Aðrar viðkomandi royndir er sjálvandi ein fyrimunur. Tú kannst bæði arbeiða sjálvstøðugt og saman í bólki.
Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og fjøllbroytt starv, har tú ert við til at mynda tín egna arbeiðsdag, samstundis sum tú fært góðar møguleikar innan eftirútbúgving.	**Vit kunnu bjóða** tær eitt spennandi og fjøllbroytt starv, har tú ert við til at mynda tín egna arbeiðsdag, samstundis sum tú fært góðar møguleikar innan eftirútbúgving.
Løn sambært avtalu.	Løn sambært avtalu.

Umsóknin, saman við viðkomandi prógvum og skjølum, skal sendast til **formula.fo**, postboks 1078, 110 Tórshavn og skal stílast til Fróða Magnussen, ella á teldupostadressu *starv@formula.fo* innan 1. mars 2000.

Eisini ber til at ringja til okkara á tel 311115 fyri at fáa fleiri upplýsingar um omanfyrinevndu størv.

Microsoft Certified Solution Provider

formula.fo
fremst innan KT